ítróttur

Nr. 119 • mikudagur • 26. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tveir vinnarar afturat vórðu tiknir í Hósvík

**Eingin mannfólkamanning hevur megnað at vunnið allar tríggjar kappingarnar í ár, men tað hava konufólkini umborð á Sílinum og Jarnbardi**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Tað verður torført at syrgja fyri meiri væl eydnaðari kapprógving enn henni, sum var á skránni í Hósvík leygardagin. Triðja FM stevnan í hesum kappingarárinum var framúr væl eydnað. Manningarnar, sum tóku lut, geva fyrireikarunum besta skoðsmálið. Á landi og á sjónum var sera væl fyriskipað, og kappingin varð avgreidd so skjótt, sum tað ber til. Fyrsta startskotið ljóðaði klokkan trý, og klokkuni restaði tíggju minuttir í fimm, tá 10–mannaførini komu á mál.

Sammett við undanfarnu kappingarnar var aftur hesa ferð talan um nýggjar vinnarar. Nú er støðan tann, at í øllum teimum fýra mannfólkakappingunum hava tað verið fleiri enn ein vinnari. Nýggir vinnarar hesa ferð vóru tvær manningar hjá Havnar Róðrarfelag. Havnarbáturin, sum vann allar róðrarnar í fjør, vann sera spennandi kappingina millum 10–mannaførini, og Sílið við dreingjum vann kappingina millum 5–mannafør. Hjá teimum var talan um sanna uppreisn, tí Sílið varð kolldømt og fekk tískil einki stig, tá tað næstsíðsta leygardag varð kappast á Skálafjørðinum.

Einastu manningarnar, sum framvegis hava vunnið hvørja ferð, eru Sílið við gentum og Jarnbardur við kvinnum. Serliga Sílið var sera sannførandi í Hósvík.

### Øðrvísi kapping

Leygardagin róðu vit framundir, at tað kundi fara at vísa seg, at fleiri FM vinnarar so at siga fóru at verða kosnir komandi leygardag, tá fjórða FM kappingin verður á jóansøku í Vági.

Men úrslitini í Hósvík kundu bent á, at tað í flestu kappingunum verður neyðugt at bíða inntil í hvussu so er á vestanstevnuni, sum verður í Miðvági 13. juli og kanska inntil á ólavsøku, áðrenn FM vinnararnir verða kosnir. Í fjør vórðu fleiri enn helvtin av FM kappingunum avgjørdar á vestanstevnuni.

Higartil hevur verið kappast á fleiri róðrarteinum. Soleiðis verður tað ikki í teimum trimum FM kappingunum, sum eru eftir í hesum róðrarárinum. Í Vági, í Miðvági og á ólavsøku verður bara eitt túsund metra málið rógvið.

At tað bara fer at verða kappast á stutta teininum kann hava við sær, at úrslitini fara at laga seg heilt øðrvísi, enn tey hava gjørt higartil. Serliga í kappingunum, har tað frammanundan hevur verið kappast á longru teinunum, er lagt upp til spennandi og kanska øðrvísi kappingar. Her verður hugsað um 6–mannaførini við monnum, 8–mannaførini og serliga 10–mannaførini, har kappingin á longru teinunum hevur verið tættari, enn hon hevur verið nógvu tey seinastu árini.

Í fjør vann Fípan Fagra FM fyri gentur. Tjaldrið vann FM fyri dreingir. Strálan vann kappingina millum 6–mannafør við monnum, Páll Fangi vann kappingina millum 6–mannafør við kvinnur, Nevið Reyða var bestur av 8–mannaførunum, og Havnarbáturin vann FM kappingina millum 10–mannaførini. Í Hósvík var tað av hesum seks manningunum bara Havnarbáturin, sum vann, og eingin av FM vinnarunum í fjør er fremst í FM kappingini í ár. Tað boðar frá, at tað ikki altíð gongst, sum tað verður roknað við. Tí er einki at ivast í, at tað er lagt upp til ein sera spennandi seinna part av róðrarárinum 2002.

## FM-støðan

### Støðan í FM eftir róðurin á sundalagsstevnuni

**5-mannfør dreingir**

| | bátur | stig hesaferð | stig íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | Fípan Fagra | 3 | 17 |
| 2 | Blikur | 5 | 14 |
| 3 | Sílið | 7 | 10 |
| 4 | Tjaldrið | 2 | 10 |
| 5 | Havfrúgvin | 4 | 9 |
| 6 | Drekin | 1 | 5 |
| 7 | Ørnin | 1 | |

**6-mannafør, kvinnur**

| | bátur | stig hesaferð | stig íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 7 | 21 |
| 2 | Páll Fangi | 4 | 14 |
| 3 | Riddarin | 5 | 13 |
| 4 | Gongurólvur | 3 | 9 |
| 5 | Víkingur | 2 | 5 |
| 6 | Hvessingur | 1 | 3 |
| 7 | Lómur | 1 | |

**5-mannafør, gentur**

| | bátur | stig hesaferð | stig íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | Sílið | 7 | 21 |
| 2 | Fípan Fagra | 5 | 14 |
| 3 | Ørnin | 2 | 11 |
| 4 | Blikur | 4 | 10 |
| 5 | Havfrúgvin | 3 | 6 |
| 6 | Drekin | 1 | 4 |

**6-mannafør, menn**

| | bátur | stig hesaferð | stig íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | Smyril | 7 | 19 |
| 2 | Páll Fangi | 5 | 17 |
| 3 | Gongurólvur | 4 | 10 |
| 4 | Hvessingur | 2 | 10 |
| 5 | Sølmundur | 3 | 6 |
| 6 | Strálan | 1 | 4 |

**8-mannafør**

| | bátur | stig hesaferð | stig íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 7 | 19 |
| 2 | Argjabáturin | 5 | 17 |
| 3 | Knørrur | 4 | 12 |
| 4 | Húsavíkingur | 3 | 8 |
| 5 | Kvívíksbáturin | | 3 |
| 6 | Nevið Reyða | | 3 |
| 7 | Ørvur | 2 | 2 |

**10-mannafør**

| | bátur | stig hesaferð | stig íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 3 | 17 |
| 2 | Havnarbáturin | 7 | 15 |
| 3 | Klaksvíkingur | 4 | 13 |
| 4 | Vestmenningur | 5 | 12 |
| 5 | Nólsoyingur | 2 | 6 |

# Sundalagsstevnan

### Úrslitini frá kapppróðrinum á sundalagsstevnuni um vikuskiftið

**5-mannfør dreingir**

| | bátur | tíð |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 5.05,17 |
| 2 | Blikur | 5.05,21 |
| 3 | Havfrúgvin | 5.08,10 |
| 4 | Fípan Fagra | 5.09,02 |
| 5 | Tjaldrið | 5.09,08 |
| 6 | Drekin | 5.12,20 |
| 7 | Ørnin | 5.18,05 |
| 8 | Junkarin | 5.33,16 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 5.09,00 |
| 2 | Riddarin | 5.10,05 |
| 3 | Páll Fangi | 5.13,07 |
| 4 | Gongurólvur | 5.18,21 |
| 5 | Víkingur | 5.30,08 |
| 6 | Hvessingur | 5.30,23 |
| 7 | Lómur | 5.36,14 |
| 8 | Snopprikkur | 5.39,09 |

**5-mannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 5.15,15 |
| 2 | Fípan Fagra | 5.20,20 |
| 3 | Blikur | 5.21,16 |
| 4 | Havfrúgvin | 5.24,16 |
| 5 | Ørnin | 5.25,17 |
| 6 | Drekin | 5.29,05 |
| 7 | Tjaldrið | 5.30,03 |
| 8 | Tekla | 5.35,12 |
| 9 | Royndin Fríða | 5.43,00 |
| 10 | Frúgvin | 5.43,07 |
| 11 | Junkarin | 5.51,08 |
| 12 | Dúgvan | 5.53,15 |
| 13 | Firvaldur | 6.19,00 |

**6-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Smyril | 7.23,18 |
| 2 | Páll Fangi | 7.26,16 |
| 4 | Sølmundur | 7.29,15 |
| 5 | Hvessingur | 7.30,04 |
| 6 | Strálan | 7.34,00 |
| 7 | Jarnbardur | 7.40,08 |
| 8 | Snopprikkur | 7.45,10 |
| 9 | Hósvíkingur | 7.52,17 |
| 10 | Víkingur | 7.52,23 |

**8-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 7.07,11 |
| 2 | Argjabáturin | 7.07,13 |
| 3 | Knørrur | 7.13,04 |
| 4 | Húsavíkingur | 7.35,02 |
| 5 | Ørvur | 7.37,18 |

**10-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnarbáturin | 9.15,10 |
| 2 | Vestmenningur | 9.16,04 |
| 3 | Klaksvíkingur | 9.16,05 |
| 4 | Eysturoyingur | 9.16,10 |
| 5 | Nólsoyingur | 9.38,10 |



# Sílið burtur úr ongum og á fyrsta plássið

**Havnardreingirnir hava lagt taktikkin eitt sindur øðrvísi. Teir vilja ikki siga, hvat tað er, men hesa ferð hilnaðist tað sera væl**

5-MANNAFØR DREINGIR
*Jóannes Hansen*



*Eftir at hava fingið reyða kortið á eystanstevnu, eydnaðist tað hesa ferð hjá Sílinum at vinna dreingjaróðurin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Teir hava gjørt eitt orduligt lop síðstu vikuna. Tað eru havnardreingirnar umborð á Sílinum, sum tað verður sipað til. Á Skálafjørðinum næstsíðsta leygardag vórðu teir kolldømdir. Teir komu næstfyrstir á mál, men teir fingu einki stig. Undir róðrinum fingu teir tvey gul kort, og harvið fingu teir reytt kort og vórðu sjúgvaðir úr kappingini. Tað var ein orduligur frammaná.

Í síðstu viku nevndu vit, at teir umborð á Sílinum fingu annað gula kortið fyri mistak í startinum og seinna kortið fyri at hava stýrt skeivt. Tað var tað, sum okkum var upplýst. Men hetta var ikki heilt rætt. Sílið fekk á Skálafjørðinum tvey gul kort fyri at stýra skeivt.

– Vit mugu bara staðfesta, at ta ferðina var okkara avrik ikki nóg gott, sjálvt um vit í sjálvum róðrinum vóru frammarlaga. Í síðstu viku vandu vit nógv fyri at fáa stýringina í ordan, og tíbetur eydnaðist tað væl.

Tað er bátsformaðurin umborð á Sílinum, sum vit práta við. Hann eitur Jóan Pauli Jensen. Hann er fimtan ára gamal, og hann er yngsti maður umborð á Sílinum. Hinir eru allir 16 og 17 ára gamlir. Saman við bátsformanninum eru tað tríggir aðrir umborð á Sílinum, sum ikki hava róð kapp áður. Við kiksaranum á Skálafjørðinum og lítlu royndunum í huga er einki at siga til, at teir umborð á Sílinum vóru væl nøgdir eftir sigurin í Hósvík, sum teir siga kom óvart á teir:

– Bæði undir venjing og eisini á Skálafjørðinum hildu vit, at báturin gekk væl, men tað var ikki fyrrenn hesa ferð, at vit rættuliga fingu úrslit burturúr.

*Vóru tit greiðir yvir, tá tit komu á mál, at tit høvdu vunnið?*

– Nei, tað vóru vit ikki. Vit roknaðu við, at vit vóru endaðir á øðrum plássi. Róðursmaðurin hjá okkum helt, at Blikur var frammanfyri okkum. Tí var tað uppaftur hugaligari, tá vit fingu at vita, at vit høvdu vunnið. Tað var fantastiska stuttligt, sigur bátsformaðurin umborð á Sílinum.

*Hava tit skift fólk, síðani tað er farið at ganga so væl hjá tykkum nú?*

– Vit fóru at venja í januar, og vit fóru í bátin í apríl. Síðani tá hava vit verið teir somu, og vit sita í somu plássunum, sum vit hava gjørt alla tíðina.

*Hvat er tað so, sum hevur havt við sær, at tit nú vunnu?*

– Eg haldi, at vit hava róð væl alla tíðina. Hesa ferð gekk tað, sum vit alla tíðina hava vilja, at tað skuldi ganga. Av tí at vit onga plasering fingu á Skálafjørðinum, so lógu vit uttast ella norðastir í Hósvík. Bestu bátarnir liggja í miðjuni. Tað kann hugsast, at hinir hava ikki orduliga roknað við okkum. Men tað fara teir heilt víst at gera næstu ferð, tí tá verða tað vit, sum fara at liggja í miðjuni, so tá verður tað torført, heldur Jóan Pauli Jensen

*Vóna tit framvegis, at tað skal eydnast tykkum at vinna FM heitið?*

– Tað verður sera torført, tí vit hava mist so nógv stig í tveimum teimum fyrstu kappingunum. Men vit taka ein róður í senn, og so fáa vit at síggja, hvussu tað fer at hilnast í samantalda úrslitinum. Um vit skulu verða bestir, so skulu teir, sum í tveimum teimum fyrstu kappingunum vunnu og vóru frammarlaga, ikki fáa so góð úrslit. Vit kunnu gera okkara besta, men vit eru ikki harrar yvir, hvussu tað hilnast hjá hinum bátunum, sum vit kappast við. Men tað verður sera spennandi, heldur bátsformaðurin á Sílinum.

### Fípan misti

Í tveimum teimum fyrstu FM róðrunum vóru tað dreingirnir umborð á Fípuni Føgru, sum vunnu. Hesa ferð megnaðu teir ikki meiri enn fjórða plássið. Serliga í startinum hilnaðist tað illa hjá klaksvíks dreingjum. Teir duttu beinanvegin aftur á fimta ella sætta plássið. So fingu teir takið og vunnu seg samt og javnt fram á triðja plássið, men tað mundi hava ov nógva orkunýtslu við sær, tí í endaspurtinum datt Fípan Fagra aftur á fjórða plássið.

Argjadreingir umborð á Bliki vóru leingi rættuliga væl við í kappingini um fremsta plássið. Tá bátarnir komu inn ímóti málinum, tóktist tað sum um, at Blikur var fremstur, men sambært mál upptøkunum var Sílið 4/25 partar av einum sekundi frammanfyri Blik.

Havfrúgvin og Tjaldrið hava undanfarnu árini staðið seg eina best í dreingjakappingini. Í ár hevur ikki hilnast so væl, men á Sundalagsstevnuni vóru ábendingar um, at hesir báðir bátarnir fara at vera við í kappingini í seinnu helvt av róðrarárinum. Havfrúgvin gjørdist nummar trý, men munurin fram til Blik var ein bátslongd. Tjaldrið endaði á fimta plássi, og Drekin, sum tóktist vera væl við á fyrsta teininum, endaði á sætta plássinum.

# Sílið svimur í flokki fyri seg sjálvt

**Aftur hesa ferð var nýggi báturin hjá Havnar Róðrarfelag langt undan øllum hinum á mál**

5–MANNAFØR GENTUR
*Jóannes Hansen*

Í flestu kappingunum hevur talan verið um størri og smærri broytingar í teimum trimum stevnunum, sum hava verið higartil. Men í einari kapping er púrt eingin broyting. Tað er kappingin millum gentumanningarnar, sum tað verður sipað til.

Sílið var sannførandi í Klaksvík. Sílið var aftur sannførandi í Runavík. Og tá triðja FM kappingin leygardagin var á skránni í Hósvík, var Sílið aftur sera sannførandi vinnari. Tað er sera ilt at ímynda sær annan vinnara í teimum trimum kappingunum, sum eru eftir í hesum róðrarárinum, og harvið kann tað vera so skjótt, at Sílið verður FM vinnari.

Hesa ferð var Sílið ikki fremst á fyrstu metrunum. Men tað var skjótt, at tær blandaðu seg upp í kappingina. Fípan Fagra, Ørnin og Blikur hoyra til manningarnar, sum hava vunnið nógv seinastu árini. Hesir bátarnir høvdu hug til at blanda seg uppí, men tá hálvt málið var rógvið, hevði Silið funnið rætta lagið, tær løgdu seg hálva bátslongd framum kappingarneytarnar – um tað ber til at kalla hinar manningarnar soleiðis – munurin gjørdist skjótt meiri enn eina bátslongd, og á málinum var Sílið tvær bátslongdir frammanfyri næstu bátarnar.

Fípan Fagra fekk gult kort fyri ikki at stýra nóg neyvt, men klaksvíksgenturnar megnaðu kortini at gerast nummar tvey. Tær vóru kortini í góðari kapping við Blik av Argjum. Argjagentur komu á mál eina hálva bátslongd aftanfyri Fípuna Føgru. Havfrúgvin troðkaði seg inn ímillum Blik og Ørnina.




*Gentumanningin á Sílinum vann triðja róðurin upp í slag*

*Mynd Jens Kristian Vang*